# Sonur Tummas



Tað vardi ongan, tá 16 ára gamli sonur Tummas Joensen brádliga tók seg av døgum fyri átta árum síðani. Og Tummas veit framvegis ikki, hví hann gjørdi tað.
– Ikki fyrr enn eg umsíðir góðtók, at eg ongantíð fái nakað svar, bar tað til at koma víðari í lívinum, sigur Tummas

SJÁLVMORÐ

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Tey siga, at tað ringasta, eitt menniskja kann uppliva, er at missa sítt barn ... Tummas hyggur hugsunarsamur fram fyri seg, meðan hann leitar eftir orðunum og heldur fram

– Men at missa eitt barn, sum tók sítt egna lív, er at skrúva pínuna eitt vet longur. Onki kann verða ræðuligari.

## Hví?

Tá 16 ára gamli Kristian eitt kvøldið fyri átta árum síðani tók lívið av sær, var tað, sum alt innaní Tummasi steðgaði upp. Hvørt sekund, hvør smálutur hevur brent seg í minnið, og so sjokkið, pínan, og tankarnir, sum bara mólu í ring uttan íhald.

– Tann fyrsta langa tíðin kendist sum ein endaleys marra av pínu og sakni. Til endan var tað, sum vildi høvdið spreingjast, og eg hevði bara hug at rópa: Nær fær hetta ein enda! Eg var púra sannførdur um, at eg aldrin aftur fór flenna, hava tað stuttligt ella yvirhøvur kunna liva aftur.

> *– Frá eini løtu til aðra lá harmoniska myndin hjá mær av okkum báðum í skeljasori*

Í eina rúma tíð aftaná fylti sjálvmorðið alt lívið hjá Tummasi. Kristian hevði onki skilnaðarbræv skrivað, og fyrstu tíðina royndi Tummas alt fyri at finna okkurt svar, onkra ábending um, hvat kundi havt fingið Kristian til at taka eina so ræðuliga avgerð.

– Eg havi ikki tal á, hvussu ofta eg havi sitið og rótað runt í telduni hjá honum, opna hvørja einastu fílu bara fyri at finna okkurt lítið tekin um eitt svar av onkrum slagi. Men eg fann ongantíð nakað. Tað hjálpti heldur onki at spyrja nakran annan, tí hini, sum kendu hann, skiltu líka lítið sum eg, sigur Tummas og leggur afturat, at at síggja til hevði Kristian í allar mátar eitt gott lív. Hann var fittur, skilagóður og kláraði seg væl í skúlanum og tóktist ikki á nakran hátt at vera nívdur av nøkrum so álvarsomum, sum sjálvmorðstonkum.

– Inn ímillum havi eg spælt við tankan um, at tað má hava verið eitt óhapp, at tað ongantíð veruliga var ætlanin hjá Kristiani at taka seg av døgum. Men eg veit tað framvegis ikki.

## Skuldarkenslan

Ikki fyrr enn seinni gekk tað upp fyri Tummasi, at hann í grundini ongan hevði at spyrja. Hann var tann, sum kendi sonin best, so tá hann onki svar hevði sjálvur, var tað í royndog veru nyttuleyst at halda fram at leita.

– Við hesum kom eisini skuldarkenslan. Um eg nú var tann, sum var tættast at Kristiani, hví hevði eg so ikki varnast, at okkurt var galið? Var tað ikki mín ábyrgd, sum pápi at síggja slíkt hjá mínum barni? Hvar hevði eg svikið? Og eg, sum trúði, at vit báðir høvdu tað so gott saman. Frá eini løtu til aðra lá harmoniska myndin hjá mær av okkum báðum í skeljasori, og har stóð eg og skilti onki.

Sum frá leið byrjaði Tummas at skriva sínar tankar niður, tá hann fór í song um kvøldarnar. Kanska fyrst í eini roynd at halda óttanum fyri einseminum og marrudreymunum burtur, men á onkran hátt hjálpti tað seta orð á kenslurnar. Eitt tað síðsta, hann skrivaði í bókina, ljóðaði á leið soleiðis:

“Uttan mun til, hvussu nógv eg royni, verða tað altíð spurningar, sum eg ongantíð fái nakað svar uppá. Tað *má* eg bara góðtaka, um eg skal koma víðari”.

– Ikki fyrr enn eg veruliga kom til sættis við, at soleiðis mátti tað bara vera, bleiv tað pláss fyri øðrum í tonkunum. Seinni kom so øðin, tá eg í huganum endiliga tordi at spyrja Kristian, hvat hann billaði sær inn at gera soleiðis ímóti síni familju, systkjun og øllum, sum vóru góð við hann. Øðin kendist sum ein forloysandi lætti og enn eitt fet víðari frameftir.

## Endi og byrjan

Mitt í øllum sorgarleikinum helt lívið rundan um Tummas fram á sín mest ítøkiliga hátt. Dáman hjá honum var uppá vegin, og seks mánaðir eftir, at hann hevði sagt soninum farvæl á sjúkrahúsinum, stóð Tummas aftur har - hesuferð fyri at taka ímóti dóttur síni.

– Tað var ein ótrúliga intens tíð, har eg upplivdi bæði byrjanina og endan á livinum innan fyri eitt stutt tíðarskeið. Gleðin yvir dóttrina varð besti og mest lívsjáttandi mátin, eg kundi ynskja mær, at koma víðari, men hon mátti ikki blíva ein máti at flýggja frá sorgini yvir Kristian. Samstundis var tað mín ábyrgd, at hini bæði systkini hjá Kristiani eisini fótaðu sær so væl, sum gjørligt, bæði í sorgini og í nýggja lívinum, tey nú vóru partur av.

Tummas er takksamur fyri, at lívið lagaði seg á ein hátt, sum uttan iva hevur hjálpt honum lættari víðari, enn hann kundi væntað. Hinvegin heldur hann seg ikki hava roynt at skáka sær undan pínuni eftir sjálvmorðið hjá Kristiani, hóast tað onkuntíð kundi verða freistandi.

– Tað hava verið løtur, har eg havi havt hug at givið onkrum øðrum skyldina fyri tað, sum hendi. Eg eri eisini greiður yvir, at tað, at Kristian ikki hevði skrivað eitt skilnaðarbræv, hevur givið mær møguleika at finna ta orsøk, eg sjálvur best kundi liva við. Men eg veit, at eg ikki tilvitað havi roynt at runnið undan pínuni, sigur Tummas og minnist, beint eftir, at hann hevði funnið Kristian, at læknin spurdi, um hann vildi hava eina sproytu.

– Eg takkaði nei og segði, at hetta var ikki ein pína, sum kundi sproytast burtur, og soleiðis havi eg nokk hugsað alla tíðina. Uttan mun til hvat hendir, so verði eg altíð pápi Kristian, sum gjørdi sjálvmorð, og júst ta pínuna má eg liva við einsamallur. Í síðsta enda syrgja vit øll á okkara egna hátt, sigur Tummas og leggur afturat, at

> *- Eg var púra sannførdur um, at eg aldrin aftur fór flenna, hava tað stuttligt ella yvirhøvur kunna liva aftur.*